**Fiskimálaráðið**
*Skipaeftirlitið*

# Fulltrúi/málsviðgeri

Skipaeftirlitið/Sjóvinnufyrisitingin søkir hervið eftir einum fulltrúa/málsviðgera til setan skjótast gjørligt.

Skipaeftirlitið/Sjóvinnufyrisitingin er skipað sum deild í Fiskimálaráðnum, og arbeiðsstaðurin er Miðvágur.

**Starvið inniber m.a. hesar uppgávur:**
- málsviðgerð innan sjóvinnulóggávu
- útgávu av sjóvinnubrøvum, siglingarbókum og samleikaprógvum
- átekna heilsuprógv, viðgera undantaksloyvir til mynstringar v.m.
- vanligt skrivstovuarbeiði
- telefonavgreiðsla

**Førleikakrøv**

**Til starvið krevst:**
- viðkomandi útbúgving
- góð evni at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli
- telduførleika á brúkarastøði
- góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- góð samstarvsevni

Grundleggjandi royndir innan virkisøkini er ein fyrimunur.

**Setanartreytir:**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og stovnar undir tí, umframt hini aðalráðini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin í løtuni er Skipaeftirlitið/Sjóvinnufyrisitingin.

Tann, ið settur verður, má tí kunna tola broytingar í starvinum og økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálaráðnum.

Umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum, skulu vera Skipaeftirlitinum/Sjóvinnufyrisitingini í hendi í seinasta lagi 15. apríl, 2003 kl. 12.00.

Umsóknir skulu sendast til:

**Skipaeftirlitið, Box 26, 370 Miðvágur**

Fyrispurningar viðvíkjandi starvinum fáast við at ringja til Skipaeftirlitið á tlf. 355600 og tosa við Óla Hans Hammer Olsen, deildarstjóra ella tlf. 353030 og tosa við Johild Ziskason, fulltrúa.

# Frítíðarskúlin í Vági

Børn verða innskrivaði til skúlaárið 2003/2004.

Seinasta freist er 15. mai 2003.

**Frítíðarskúlin í Vági**
Tlf. 229482

# Heimarøktin Sandoyar øki

## lýsir eftir heilsustarvsfólki

Í sambandi við at starvsfólk fara í skúla, og til feriuavloysarar verður søkt eftir sjúkrarøktarfrøðingum, heilsurøktarum og heilsu/heimahjálparum , at byrja sum skjótast ella eftir avtalu til 31.8.03

Eitt starv fyri sjúkrarøktarfrøðing í barnsburðarfarloyvi er eisini leyst at søkja frá 1.6.03 til 31.12.03, við møguleika fyri forleingjan

Heimarøktin Sandoyar øki er ein skipan, har heimarøkt, røktarheims- og sambýlisrøkt og rakstur verður samskipa, og har heilsustarvsfólkini starvast á øllum eindum, og í skiftandi vaktum.

**Vit søkja eftir sjúkrarøktarfrøðingum og heilsurøktarum:**
- Sum hava hug og hegni at samstarva við ymiskar fakbólkar.
- Sum hava hug at starvast bæði inni á stovni og úti í heimarøktini.
- Sum hava hug og hegni at undirvísa og vegleiða starvsfelagar,lesandi og næmingar.

**Vit søkja eftir heilsu/heimahjálparum:**
- Sum hava hug og hegni at samstarva við ymiskar fakbólkar.
- Sum hava hug at arbeiða bæði inni á stovni og úti í heimarøktini.
- Sum hava hug at undirvísa og vegleiða heilsuhjálparanæmingar

**Vit kunnu bjóða:**
- Eitt spennandi og mennandi starv har arbeitt verður tvørfakligt.
- Eitt starv við skiftandi avbjóðingum.
- Eitt starv í einum øki í støðugari menning.

Størvini verða lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til Ásu Davidsen, økisleiðara, tlf. 361749/228681, ella Annu Horn, varaleiðara, tlf.361791.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum v.m. skal sendast til Heimarøktina Sandoyar øki, Áar-*garður, 210 Sandur.

**Umsóknarfreist: 1.5.03**

SJÚKRAKASSI

# Umboðsvalið er útsett

Umboðsvalið, sum skuldi vera 15. apríl, er útsett til mikudagin 23. apríl 2003.

**Havnar Sjúkrakassi**
9. apríl 2003

# Útbjóðing

Vegna Fuglafjarðar kommunu verður arbeiði í samband við útstykking Vestur í Bø í Fuglafirði boðin út í almennari útbjóðing.

Arbeiðið umfatar, gerð av umleið 240 metrar av útstykking av útstykkingarvegi, við tilhoyrandi kloakk og vatnleiðingararbeiði.

Lisitatiónin verður í Býráðshúsinum í Fuglafirði tann 14. mai 2003 kl. 11.00, og kunnu teir í boðið hava verða hjástaddir.

útbjóðingartilfar kann bíleggjast hjá Fuglafjarðar kommunu, tlf. 444006 móti veðhaldi kr. 5.000,- sum verður at gjalda inn á konto í Føroya Banka nr. 6460 2205965

Fuglafjørður 09. apríl 2003

**Fuglafjarðar kommuna**
Tekniska deild



Um hóskandi boð fæst, er hesin snøggi chopparin, ein **Intruder 1400**, til sølu. Súkklan er góð at koyra, er kraftmikil og ógvuliga vøkur. Súkklan hevur bert koyrt 16 tkm og er sum spildurnýggj.

Myndir og nærri skrivilsi av súkkluni kann fáast við at ringja tlf. 212536, ella skriva ein teldupost til jakup_sandberg@hotmail.com

Møgulig fígging kann útvegast.

# Frá Havnar Handverkarafelag

Skrivstovan verður stongd vegna flyting frá mánadegi 14. apríl.
Latið verður upp aftur í nýggju hølunum í Sjúrðargøtu 20, mikudagin 23. apríl kl. 09.00.

**Havnar Handverkarafelag**

# Hús í Vági

Hús á Lágabø í Vági til sølu.
Prísuppskot : 450.000 kr

**Tlf. 373874**



## Farloyvisstarv

# Pedagogur

**til Sambýli í Runavík**

Innan Almannaráðið og stovnar undir tí, við tænastu á sambýlinum á Rúnarvegi í Runavík, er eitt farloyvisstarv vegna barnsburðs leyst at søkja frá 15 mai 2003 og til 01 januar 2004.

Starvið verður sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag.

Sambýlið er upprættað til 6 menningartarnað fólk, og uppgávan hjá umsókjaranum verður sostatt at vegleiða íbúgvarnar í øllum tí, sum tey hava tørv á.
- Tað verður kravt av tær at tú við tíni pedagogisku vitan, kann menna hvønn av teimum sum búgva í sambýlinum, til at húsast saman í felagsskapi hvør við annan, bæði til innanhýsis viðurskiftir og í samfelagnum sum heild.
- At tú saman við íbúgvunum vil skapa trivna og á ein pedagogiskan hátt tryggjar at menningarmøguleikarnir koma í fyrstu røð.
- Somuleiðis er tað av týdningi at tú hevur vilja til at samskifta við okkara avvarðandi og tey, sum vit umgangast dagliga.

Av tí at sambýlið nýliga er upprættað av nýggjum, kunnu vit bjóða tær eitt spennandi arbeiði, við nógvum avbjóðingum, bæði persónliga og fakliga.

Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna, skiftandi vaktir + vikuskiftir og heilidagar.

Eru nærri spurningar til starvið, kunnu tit venda tykkum til leiðarin á tlf. 448424 ella 226121
Email: burun@serforsorg.fo
Ert tú áhugað/ur, so send eina umsókn við avriti av prógvum innan 27.04-2003.

Umsóknir skulu stílast til:

**Sambýlið á Rúnarvegi**
Att: Leiðarin
Rúnarvegur 3
Fo - 620 Runavík

# Norðoya Røktarheim

**Klaksvík**

Søkt verður eftir summarfrítíðaravloysarum til heimið frá 01. juni til 30. september 2003. Vit søkja avloysarar fyri sjúkrarøktarfrøðingar, heilsurøktarar og heilsuhjálparar.

Heimið hevur 2 deildir við 18 búplássum á hvørjari deild. Arbeitt verður í skiftandi vaktum.

Umsókn, saman við avriti av prógvi og autorisation verður at senda til leiðaran fyri Norðoya Røktarheim, F0-700 Klaksvík.

Lønar- og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarráðið og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar.

Umsóknarfreist: 24. apríl 2003.

MIÐVÁGS KOMMUNA

# Leiðari til Útibarnagarðin í Miðvági

Miðvágs kommuna søkir við hesum eftir leiðara til Útibarnagarðin í Miðvági, at byrja tann 1. juni 2003.

Í Útibarnagarðinum ganga 22 børn í aldrinum 5 til 7 ár, og eru 5 starvsfólk knýtt at stovninum.

Eftir summarfrítíðina er ætlanin at víðka um tilboðið, til at fevna um børn, frá 3 ára aldri og til tey fara í skúla.

Útibarnagarðurin er í Gamla Skúla, sum er um at verða liðugt umvældur. Hann liggur í sera hugnaligum umhvørvi, beint við sandin og av somu orsøk hevur náttúran ein stóran leiklut í gerandisdegnum hjá børnunum.

Vit ynskja okkum ein leiðara, sum:
- er útbúgvin pedagogur
- kann og vil leiða
- hevur fíggjarligu ábyrgdina av Útibarnagarðinum
- kann arbeiða sjálvstøðugt, taka avgerðir og geva greið boð
- er til reiðar, at fara virkin inn í og verða ein partur av starvsfólkabólkinum
- hevur hugsjónir, tá tað snýr seg um virksemi í einum Útibarnagarði
- leggur stóran dent á náttúruna og eitt reint og roykfrítt umhvørvi
- leggur dent á starvsfólkatrivnað og menning
- saman við starvsfólkunum er við til at menna tað pedagogiska arbeiðið
- hevur teldukunnleika

Løn sambært avtalu við Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Maluna Helgadóttir tlf. 333355 ella 226888.

Umsóknir vera, saman við upplýsingum um útbúgving, royndum og møguligum viðmælum, at senda til Miðvágs kommunu, 370 Miðvágur í seinasta lagi 22. apríl 2003. Viðmerk umsóknina »Leiðari«.

Kommunan skilar sær rætt til, um ikki nóg nógvar umsóknir eru, at lýsa starvið av nýggjum.

SJÚKRAKASSI

# Umboðsvalið er útsett

Umboðsvalið, sum skuldi vera 15. apríl, er útsett til mikudagin 23. apríl 2003.

**Havnar Sjúkrakassi**
9. apríl 2003

# Tøkningur til Hjálpartólamiðstøðina (HTM)

Á HTM er eitt fulltíðar starv sum tøkningur leyst at seta sum skjótast.

HTM er deild Almannastovuni og umsitur hjálpartól, umbyggingar í heiminum og avlamisbilar til fólk, ið bera brek. Í løtuni starvast 11 fólk á HTM.

Uppgávurnar hjá HTM umfata m.a.
- upplýsing, ráðgeving og leiðbeining til brúkarar, almennar myndugleikar o.o. um hjálpartól og byggi- og bústaðarspurningar
- útlán og endurnýtsla av hjálpartólum
- viðgerð og støðutakan til umsóknir um sertillagað hjálpartól, bústaðarbroytingar og avlamisbilar
- tvørfakligt samstarv – innan- og uttanhýsis

**Talan er um sera fjølbroytt og spennandi starv, ið m.a. fevnir um:**
- meting um tøkniligar loysnir
- fremjing av tøknuligum loysnum
- meting um dygd av hjálpartólum
- skipa fyri umvælingum av hjálpartólum innan- og uttanhýsis
- heimavitjanir saman við terapeutum
- ráðgeving í sambandi við íbúðarbroytingar
- størri tillagingar av hjálpartólum saman við terapeutum
- viðlíkahald av eykalutagoymslu
- fyrisitingarligar uppgávur

**Vit sóknast eftir einum starvsfelaga sum hevur:**
- viðkomandi útbúgving (maskinmeistari ella aðra tøkniliga útbúgving)
- royndir frá el- ella maskinhandverksvinnu er ein fyrimunur
- áhuga at arbeiða við hjálpartólum
- góð samstarvsevnir
- evnir at arbeiða sjálvstøðugt
- telduførleika

**Vit kunnu bjóða:**
- neyðuga eftirútbúgving og upplæring
- sjálvstøðugt arbeiði
- flextíð
- nýggja tøkni
- tætt samstarv við starvsfelagarnar
- fakligt mennandi umhvørvi

Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi fakfelag.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Palla Mortensen, leiðara ella Willy Jan Feilberg, tøkning tlf. 358300.

Umsókn við avriti av viðkomandi skjølum skal sendast til Hjálpartólamiðstøðina, Postboks 1049, 110 Tórshavn

**Umsóknarfreist:** 28. apríl 2003 kl. 14.00.

# Grundøki til sølu

Um hóskandi boð fæst, er grundøki uppi undir Varða, Tórshavn, til sølu. Grundøkið er uml. 2.000 fermetrar til støddar.

Áhugað kunnu venda sær til tlf. **50 87 00**